KT-klekingardepilin

Lýsing eftir verkætlanum

Vinnumálastýrið lýsir eftir verkætlanum til KT-Klekingardepilin.

Endamálið við klekingardeplinum er at skapa serligar karmar fyri menning av nýggjum KT-fyritøkum við at geva teimum virkisligar karmar og lætta teimum um atgongdina til fígging og ráðgeving í byrjanartíðini, tvs. í fyrstu stigunum í verkætlanartilgongdini, við tí máli at handilsgera teirra tøkniligu menningarhugskot.

Málbólkurin er íverksetarar, sum ynskja at stovna egið virki fyri at handilsgera hugskot um nýskapandi kunningartøkniligar vørur ella tænastur.

Depilin er skipaður undir leiðslu av einum stýri, sum m.a. tekur støðu til umsóknir. Depilin húsast á Menningarstovuni, men er møguleiki fyri, at verkætlanir eisini verða hýstar aðrastaðni í Føroyum samskipaðar undir deplinum á Menningarstovuni.

Depilin veitir:

- Ráðgeving til verkætlanirnar í KT-klekingardeplinum
- Samskipan av átøkum yvirfyri íleggjarum, framtaksfeløgum og fíggingarstovnum
- Skrivstovuhjálp og umsitingarligar tænastur, bókhald og løgfrøðiliga ráðgeving

Krøv til verkætlanir:

Til verkætlanir, sum skulu setast í verk undir KT- Klekingardeplinum, eru m.a. hesi krøv:

- Nýskapandi KT-hugskot, ið kunna mennast til vørur ella tænastur til úflutnings.
- Verkætlanin skal tá hon er komin í depilin verða skipað í serstakari løgfrøðiligari eind, t.d. í einstaklingavirki ella smápartafelag. Tað er ikki ein treyt, at ein fyritøka longu er stovnað, ella at ein liðug vøra/tænasta fyriliggur.

Hvør verkætlan kann verða húsað í deplinum í mesta lagi í 2 ár.

Umsókn/hugskotslýsing:

KT-Klekingardepilin viðgerð umsóknir leypandi, men av tí at avmarkað pláss er í deplinum, er tað ynskiligt, at umsóknir verða sendar inn skjótast gjørligt.

Kravið til umsóknina er, í fyrsta umfari bert at hugskotið er væl lýst (1-2 síður). Tey hugskot ið depilin metir hava ein burðardyggan møguleika, fáa hjálp til uppsetan av fullfíggjaðari virkisætlan við fíggjarætlan fyri tíðarskeiðið hjá verkætlanini í deplinum, sum síðani verður løgd fyri stýrið fyri KT-klekingardeplinum til støðugtakan

Umsóknir skulu sendast til: **KT-Klekingardepilin * Bryggjubakki 12 * 100 Tórshavn**. Nærri upplýsingar kunna fáast frá depilssamskipara, Símun Hammer á tlf. 449591, e-mail: konsult@konsult.fo. Reglugerðin fyri depilin er at finna á heimasíðuni hjá Menningarstovuni www.trade.fo.

Hálvársroknskapur 2001

Rakstrarroknskapur	2001	2000
Rentuinntøkur v.m.	157.359	126.786
Rentuútreiðslur v.m.	66.921	43.094
Rentuinntøkur netto	**90.438**	**83.692**
Vinningsbýti av kapitalpørtum	401	57
Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur	5.693	3.793
Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir	23	0
Rentu- og ómaksgjøld netto	**96.509**	**87.542**
Virðisjavning av virðisbrøvum og útl. gjaldoyra	500	-9.251
Aðrar vanligar inntøkur	2.796	3.219
Úrslit av fíggjarpostum	**99.805**	**81.510**
Útreiðslur til starvsfólk v.m og umsiting	51.055	50.992
Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum	5.720	5.688
Aðrar rakstrarútreiðslur	484	580
Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto)	3.199	3.189
Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum	-1.377	-10
Úrslit av vanligum rakstri	**37.970**	**21.051**
Skattur	8.039	6.438
Úrslit eftir skatt	**29.931**	**14.613**

Fíggjarstøða	2001	2000
Ogn		
Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankum	39.761	204.207
Áogn í lánistovnum	350.960	216.677
Útlán	3.160.450	2.935.005
Lánsbrøv v.m.	674.775	795.304
Partabrøv v.m.	69.522	13.292
Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum	7.524	3.154
Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum	858	870
Óítøkiligar ognir	0	0
Ítøkiligar ognir	131.889	133.068
Onnur ogn	17.449	22.621
Tíðarskeiðsavmarkingar	7.423	6.986
Ogn tilsamans	**4.460.611**	**4.331.184**
Skuld		
Skuld til lánistovnar	134.949	164.148
Innlán	3.494.293	3.413.261
Onnur skuld	46.492	33.798
Tíðarskeiðsavmarkingar	0	0
Burturleggingar til útreiðslur	3.553	4.506
Úrslit higartil í ár	29.931	14.613
Eginpeningur	751.393	700.858
Skuld tilsamans	**4.460.611**	**4.331.184**
Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan		
Ábyrgdir	81.825	47.328
Aðrar skyldur	103.739	89.799
Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan tilsamans	**185.564**	**137.127**

FØROYA SPARIKASSI

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Sosialurin -tað loysir seg

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur fra SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 28. aug. og á **Landssjúkrahúsinum** 29. aug. 2001.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 54 63**, týsdag og mikudag kl. 10-12.

Avloysari

Søkt verður eftir einum fryntligum, fyrikomandi og røskum fólki at byrja skjótast gjørligt.

Skiftandi vaktir.

Løn eftir avtalu.

Havnar Bio

Tlf. 311956

Summarfrí

Stongt er til 27.08.01.

Kliniskur tannteknikari
BERGUR
Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík, Tlf. 448480

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
5 heilársdekk á felgum og ein sleipikrókur til Mazda 323 biliga til søluv.
Tlf. 252383 - 448196

TOYOTA CARINA II
Árg. 86 til søluv møguliga sum eykalutir.
Tlf. 217779

TOYOTA CAMRY 1,8
Árg. 87, til søluv fyri 3.000 kr.
Tlf. 317672

HONDA CIVIC TIL SØLU
Ein Honda Civic 1.4, árg. 1988, til søluv. Áhugaði kunnu ringja
tlf. 213898

REYÐUR NISSAN PRIMERA 2,0
Diesel, árg. 95, koyrt 106.000 km. og nýsýnaður. Biliga til søluv.
Tlf. 217406 - 213388

ISUZU NKR LASTBILUR
fæst við at avheintað hann.
447796

TOYOTA COROLLA
Árg. 86 til søluv fyri 5.000 kr. Hevur plátur og koyrir, men krevur nakrar ábøtur.
Tlf. 310310

16" SPORTFELGUR
Vælhildnar og penar sportfelgur til Bmw og Opel við 4 boltholum til søluv fyri einans 3.500 kr.
Tlf. 227007

NISSAN SUNNY TIL SØLU
B12 16 SLX 4x4, árg. 88. Krevur umsýn
Tlf. 221651

NISSAN PATROL 4,2 DIESEL
Árg. 89, svartur og gráur. Nýsýnaður, í góðum standi, nýsproytaður og nýggj dekk. Prísuppskot 80.000 kr.
Tlf. 215853

AUDI A4 TIL SØLU
Árg. 96, bláur met. lakk. Heil galvaniseraður, koyrt uml. 90.000 km. Væl hildin og sær gott út.
Tlf. 210530 - 373824

BMW 318 IS COUPE
Sóltak, el-rútar og el-spegl. Árg. 94. Bilurin er í sera góðum standi. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 210118

NISSAN MICRA TIL SØLU
Nissan Micra árg. 89 km 143.000 til søluv fyri kr. 15.000. Nýsýnaður.
Tlf. 211990

HONDA CIVIC
1600 VTI VETEC, árg. 11/97, 168 Hk, 16" sportfelgur og heilársdekk á felgum. Stereo anlegg og sportústoyt. Til søluv, um høskandi boð fæst.
Tlf. 314726 - 221166

FORD ESCORT
til søluv.
Tlf. 214437

HONDA CIVIC 1,5 i V-TEC
til søluv. Hatchbag, 114 Hk, árg. juni 98, koyrt 80.000 km.
Tlf. 222238

CITROEN AX 11 TRE
Koyrt 106.000 km., til søluv fyri 8.000 kr.
Tlf. 448923 - 254321

CITROEN AX 11
Árg. 90. Til søluv sum eykalutir fyri 1.000 kr.
Tlf. 448923 - 254321

HONDA ACCORD 2,0 EX
Árg. 86. Spoylarar framman, vel, sportfelgur og sleipikrók. Bilurin hevur koyrt 250.000 km. Er í sera góðum standi.
Tlf. 211235

VOLVO 240 GL TIL SØLU
Árg. 89, el-rútar, og sentrallás. Í góðum standi og sær gott út. 4 felgur við pikadekkum fylgja við.
Tlf. 214478

FIAT UNO 70 SL
Árg. 89 og koyrir væl. Bilurin er til søluv.
Tlf. 310609

TOYOTA COROLLA 1.6 GTI
Árg. 89, 125 Hk og sportfelgur. Er í góðum standi.
Tlf. 214470 e. kl. 17

FORD SIERRA 1.6
Árg. 89, koyrt 120.000 km. Sýnaður mars 01. Sær sera gott út.
Tlf. 447769 - 222118

FORD SIERRA 1.6
Árg. 89, koyrt 120.000 km. Sýnaður mars 01. Sær sera gott út.
Tlf. 447769 - 222118

OPEL KADET STATIONCAR
Árg. 87, til søluv fyri 4.000 kr. Sýnaður 11/00
Tlf. 452197

PEUGEOT 306
til søluv. Ring og hoyr meir.
Tlf. 255569

OPEL KADET
Árg. 87, sýnaður nov. 00, til søluv fyri 5.000 kr.
Tlf. 316580

VÍNREYÐUR WV GOLF 1,8
Árg. 89. Hevur sportfelgur og nýggj dekk. Sýnaður í vár 01. Til søluv fyri 20.000 kr.
Tlf. 447590 - 315153

NISSAN SUNNY 16 SLX
Árg. 87, sýnaður 3/00. Alt útstoyti er nýtt. Til søluv fyri 10.000 kr.
Tlf. 319378 - 258165

SUMMARTILBOÐ!!
Variant viðfestisvognar stødd á kassa: 165x122x30 cm. TILBOÐ 6.990 kr. + skráseting. Vit útvega sleipikrókar til flest bilmerki. Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

FORD FIESTA 1.1
Árg. 86. Til søluv fyri 4.000 kr.
Tlf. 311196 - 0045 27285667

TOYOTA CAMRY AUT
Hvítur, árg. 86, sentrallás, el-rútar og krók.
Tlf. 317865 - 224910

TOYOTA HIACE
Árg. 89 til søluv. Nýsýnaður, er í góðum standi.
Tlf. 215214

TIL SØLU
HONDA CIVIC 1.5 i LS VTEC SEDAN, árg. sept. 99, 114 HK, koyrt 26.000 km, el-rútar aftan og framman, el-spegl, radio við cd-spælara, 15" sportfelgur + 14" stálfelgur við heilársdekkum. Sera væl hildin. Er metall grønur.
Tlf. 441944 - 441085 arb.

SPORT RENAULT CLIO
árg. 94 v/ sportfelgum. Bilurin er í sera góðum standi.
Tlf. 223980

BMW 324 TD STATIONCAR
Motorur v/ kvittan. Koyrt uml. 90.000 km. Er í góðum standi.
Tlf. 223980

Arbeiði

VAKSIARBEIÐI SØKIST
Eg søknist eftir eini álítandi og vælgjørdari kvinnu, ið tímir at gera reint hjá okkum einaferð um vikuna, uml. 3 tímar. Helst, tá vit eru til arbeiðis.
Tlf. 316876 - 216876

Barnaútgerð

TIL SØLU
Simo koyristólur við galesju til søluv fyri 1.500 kr. Koyristólurin er myrkabláur við reyðum og grønum ternutum mynstri. Kurv, innkeypsnet og regnskjól fylgir við.
Tlf. 312963

TIL SØLU
Gráur leður look barnavognur við dýnu, madras og sela.
Tlf. 310677

BILSTÓLUR
av merkinum Britax 0-18 kg. til søluv.
Tlf. 317216

SILVER CROSS
Svartur Silvercross Barnavognur við kurv til søluv. 2 mðr. gamal
Tlf. 313450 - 257214

Bátaútgerð

YNSKIST
Glastrevjabátur 8-10 mannafar ella líknandi ynskist til keyps.
Tlf. 257080

TIL SØLU
Bátavognur til 8-mannafar og eitt ekkolodd bíliga til søluv.
Tlf. 252383 - 448196

TIL SØLU
Linuspæl við pumpu og avkrøkjara til 10-mannafar.
Tlf. 252383 - 448196

VHF SENDARI
bíliga til søluv.
Tlf. 252383 - 448196

BÁTAMOTORUR YNSKIST
Bátamotorur ynskist til keyps. 5-6 Hk, bensin motor eitt nú Albin, F.M. ella líknandi motor.
Tlf. 421022

STUTTLEIKABÁTUR TIL SØLU
Fairline Mirage 29'. Báturin er 8,67m langur og 3,05m breiður. Motorur Volvo Penta 165 Hk við marsjferð uppá uml. 18 míl. Báturin er í sera góðum standi og vælútgjørdur. M.a. VHF, ekkolodd, GPS við plottara, køliskáp, wc v/brús, heitt/kalt vatn, oljufýr og sjónvarp. Soviplass er til 5 persónar. Boð undir kr. 300.000,00 ongan áhuga.
Telefon 217316

6-MANNAFAR
20 HK og innstaleraðum motori til søluv.
Tlf. 441631

TIL SØLU
Skrúðu aksil, Ø40 og L290.
Tlf. 282880

YNSKIST
4-5 Hk páhengsmotorur ynskist til keyps. Skal vera í góðum standi.
Tlf. 424474 - 258513

FØROYSKT 4-MANNAFAR
Føroyskt bygt 4-mannafar. Við bátinum fylgja: róður, árar, mastur og segl. Báturin, sum er nýumvældur, er lítið brúktur og í góðum standi. Báturin er til søluv, um høskandi boð fæst.
Tlf. 422213

BÁTUR YNSKIST TIL LEIGU
Bátur 27-30 fót við fiskiloyvi, helst við snellum og línuspæli, ynskist til leigu. Max. 6.000 kr. pr. mðr.
Tlf. 441675

Bingo

BINGO
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði høsdagin 16. aug. kl. 19.30. Á lutaseðli lamb í heyst.
Eldrafelagið borgin

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 19/8 kl. 16. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli, 1.000 kr.Eykaspælið 1.200 kr.Drigið verður millum spølini.
Eydnan

Bøkur

GAMLAR JUMBOBØKUR
ynskjast til keyps.
Tlf. 316131 - 215214

BØKUR TIL SKIPARASKÚLAN
Bøkur til skiparaskúlan ynskjast til keyps.
Tlf. 220311 eftir kl. 15

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Hálsketa og 2 pør av oyrnaringum úr oxideraðum silvuri burturmist á ólavsøku. Hálsketan hevur eina ametyst og eina perlu. Hevur nakar funnið tað, verður tú biðun um at seta teg í samband við meg á
tlf. 320617

KETTLINGUR FUNNIN
Grástríputur kettlingur funnin á Flatnagerði. Eigarin verður biðin um at ringja á
tlf. 318207

HVÍTUR FRENSUR FUNNIN
Hálvvaksin hvítur frensur funnin inni á Gøtu. Um nakar kennist við hann vinarliga ring á
tlf. 311137

TROYGGJA BURTURMIST
Eftir sangløtuna á Ólavsøku misti eg eina gráa føroyska troyggju við knappum á økslini. Um onkur hevur funnið hana so vinarliga ring á
tlf. 318529

Býli

HÚS/ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
Leigumálið kann byrjað beinanvegin. Tað er ætlað avhaldsfólkið, ið ikki roykja. Tað verður lagdur dentur á, at væl verður farið um.
Bill. mrk. 53-1

KAMAR TIL LEIGU
Kamar til leigu í Hoyvík.
Tlf. 322134 - 312363

ÍBÚÐ/KAMAR YNSKIST
Lesandi ynskir kamar/íbúð til leigu í Árhus skjótast tilber. Alt hevur áhugað.
Tlf. 222950

KAMAR/ÍBÚÐ YNSKIST
Ung lesandi genta ynskir kamar/íbúð í Keypmannahavn at farmaleiga frá uml. 1. sept. Royki og drekki ikki.
Tlf. 373134 - 220060

ÍBÚÐARNEYÐ
Ungt par við einum barni, søkir íbúð í Tórshavn ella nærhendis, av tí at íbúðin, ið vit búgva í verður seld 1.sep. Gjalda til tiðina.
Tlf.: 319023

SETHÚS Í VESTMANNA
Gomul umvæld sethús verða seld um høskandi boð fæst.
Tlf. 318812 el. 213272

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH
nakrar dagar síðst í des. og fyrst í jan.
Tlf. 373072

KAMAR YNSKIST
Drongur søkir kamar, við atgongd til bað og køk, í Tóshavn ella á Argjum.
Tlf. 315803

KAMAR TIL LEIGU
miðskeiðis í Reykjavík frá 1. sept. Nærri fæst at vita, við at ringja á
tlf. 5621737

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
Er tað nakar, ið hevur kamar/íbúð til leigu? Eg gangi á sjómansskúlanum, eri friðarligur og royki ikki.
Tlf. 361174 - 226436

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ella stórt kamar við atgongd til køk, wc og vaskimaskinu ynskist til leigu frá 1. okt. ella skjótast gjørligt.
Tlf. 310188 - 251106

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST Í KOLLAF
Er tað nakar, ið hevur eini hús/íbúð til leigu í Kollafirði, til eitt par við tveimun børnum, so vinarliga ring.
Tlf. 421432 - 224725 e. kl. 17.30

SUMMARHÚS TIL LEIGU
Stórt summarhús til leigu í Íslandi. Eitt lítið summarhús, ið stendur beint yvirav, er eisini til leigu. Tlf. 0035 44875871 og
tlf. 0035 44875171

ÍBÚÐ/KAMAR
20 ára gamal drongur, ið skal lesa á Kbh. universitet, søkir íbúð ella verilsi.
Tlf. 316671

HÚS/ÍBÚÐ
Par við 2 børnum (3 og 15 ár) ynskja hús/íbúð til leigu í Havn, Hoyvík ella á Argjum. Helst 3 kømur.
Tlf. 311747 - 255867

FRÍTÍÐARHÚS Í SUMBA
Hús við øllum hentleikum og sentralhita til leigu. Standa í barnavinarligum umhvørvi og hava gott útsýni. E-mail: jesvat@post.olivant.fo
Tlf. 370561

FERÐIST Í SANDOYNNI
Gísti á Mýruni í Húsavík. Allir vanligir hentleikar. Sera vakurt útsýni.
Tlf. 318037

Dýr

KETTLINGAR
Kettlingar verða latnir djóravinum. Eru 7 vikur gamlir, duga at eta og leppa. Eru reinligir. Annar er grástríputur og annar hvítur og gráur.
Tlf. 315622 - 314213

KETTLINGUR
svart/hvítur fæst við at avheintað hann.
Tlf. 317531 - 217531

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur hvølpur sóknast eftir einum góðum heimi. Mamman er labrador og pápin brúnur hálshvítur collie. Kann latast 29/9.
Tlf. 312146 e. kl. 18

TIL SØLU
Lítið brúkt fuglabúður til søluv.
Tlf. 310677

KETTLINGUR BURTURBLIVIN
4 mðr. gamal kettlingur burturblivin í Syðrugøtu sunnudagin 12. aug. Hann er hvítur og gráur/brúnur eftir

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……..

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki